# Birgar Johannessen
## – arbeiðir við leksikon yvir Havnina

**Havnin er væl fyri, tá hugsað verður um, at tað eru fleiri persónar, sum við ídni og eldhugi arbeiða við at fáa greiði á søguni hjá býnum. Ein teirra er Birgar Johannessen, sum í løtuni arbeiði við eini leksikon yvir Havnina**



*Birgar Johannessen arbeiðir við eini fullfíggjaðari leksikon yvir Havnina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

BÝARSØGA
*Magnus Gunnarsson*

Birgar Johannessen í Havn er kanska best kendur fyri sínar áhugaverdu útvarpssendingar og søguligu myndaframsýningar í SMS. Eisini er hann kendur fyri sín stóra áhuga fyri 60-unum. Hetta er bert ein partur av hansara mentunarliga arbeiði. Í løtuni arbeiðir hann við at savna tilfar til eina leksikon yvir Havnina. Í hesi leksikon vera allir upplýsingar um alt, sum hevur gingið fyri seg í Havnini frá 1900 til umleið 1970. Birgar hevur lagt alt tilfarið inn á ein databasa, soleiðis at man kann finna allar upplýsingarnar í teksti og myndum, upplýsingar um persónar, felagsskapir, stovnar, handlar, studentar, konfirmantar o.l. Tá hetta uppslagsverkið er liðugt ber til at leita fram t.d. hvør hevði fyrstu barberstovuna í Havn, hvar hon var og síðan fylgja søguni hjá øllum barberstovunum fram til 70-ini. Somuleiðis verður gjørt við t.d. handlum, kioskum, bakarum, ítróttarfeløgum, samkomum og stovnum av ymiskum slagi. Birgar sigur, at tað hevur ómetaliga stóran mentunar- og søguligan týdning fyri býin, at slíkt arbeiði verður gjørt.

### Stórt myndasavn

Birgar hevur eitt stórt myndasavn við umleið 4000 myndum. Hetta eru myndir, sum fólk í Havn hava verið so beinasom at lænt honum til at avmynda. Hann sigur, at tað eru fýra ting, sum skulu til fyri at kunna gera eitt slíkt arbeiði, tað er fyri tað fyrsta at áhugin er til staðar, at man hevur gott tol, at man er ein staðkendur persónur, og at hjartað er á røttum staði. Eisini tað at man brennur fyri sakini. Birgar brúkar tann framgangsmátan, at hann situr á bókasavninum og hyggur ígjøgnum øll tey gomlu tíðindabløðini og tekur alt relevant tilfar, sum er finna um Havnina við, so gongur kabalin at enda upp, og man hevur allar teir neyðugu upplýsingarnar. Hetta er einasti framgangsmátin, sum førir til eitt munagott úrslit.

Tað verður spennandi, serliga hjá Havnarborgarum, tá hann verður liðugur við hetta uppslagsverk. Men vit mugu ikki gloyma, at slíkt arbeiði er sera tíðar- og orkukrevjandi. Men við tí ídni og ágrýtni sum Birgar sýnir við sínum væl skipaða og greiða arbeiðsmáta, er einki at ivast í, at hetta verður ein fongur hjá Havnini, serliga av tí at tilfarið grípur inn í alla mentanina hjá býnum. Birgar leggur dent á, at higartil hevur alt arbeiðið verið gjørt í frítíðini, og tekur tað alt ov langa tíð. Hann sigur eisini, at hetta arbeiði má gerast nú, tí bíða vit nøkur ár, hava vit mist tað ættarliðið sum liggur inni við myndum og vitan um tey fyrstu 20-30 árini í 20. øld.

Birgar vónar, at hann fær tann stuðul, sum er neyðugur fyri at gera arbeiðið liðugt. Vit kunnu ganga út frá, at tá hetta arbeiðið er liðugt, verður Havnin einasti høvuðsstaðurin í øllum heiminum, ið hevur eitt slíkt fullfíggjað uppslagsverk. Umframt myndir samlar Birgar upp á nógv ymiskt annað, sum t.d. gamlar útgingar brúkslutir, modellbilar, serliga amerikanskar. Tá vit hittu Birgar, var hann í gongd við at seta afturvendandi framsýning sína upp í SMS. Á hesi framsýning verða m.a. modellbilar, umleið 1000 gamlar myndir úr Havn og ein virðismikil framsýning av gomlum myntum. Framsýningin er til frama fyri fótbóltsfelagið B36.



# Tjóðarhátíð fyri øll

Nú er ólavsøka aftur í hondum, og við hesum serblaði vil Sosialurin kasta ljós á okkara tjóðarhátíð. Vit bjóða væl komin inn í ólavsøkumeldurin, har alt kann henda og føroyingar kasta saman til hugna, hátíð og veitslulag.

Ólavsøkuna halda vit til minnis um Ólav kong hin Heilaga, men tað er helst skjótt at gloyma í tí umfatandi stevnuhaldinum, sum lokkar ung og gomul út á strætur og inn í leikhús, hallir, tjøld og borgir – altso mentanarborgir. Tjóðarhátíð okkara er yðjandi full av tiltøkum, traditiónum og turbulensi. Tað er ferð á, hóast stevnan í grundini snýr seg um at steðga á – antin tað er omaneftir ella niðaneftir.

Høvuðsstaðurin – miðdepil Føroyar – er vertur fyri ólavsøkuni, og Havnin er sanniliga ein verdugur vertur. Heimsins minsti stórbýur kann hýsa øllum frá poppkonsertum og tivoli til andaligar fundir og skrúðgongur. Tolsemið er stórt, og øll sleppa at halda stevnuna, soleiðis sum tey ynskja tað. Matarlepin er næstan endaleysur, og tað er eitthvørt fyri einhvønn.

Ítrótturin spælir ein sentralan leiklut í eini hvørjari stevnu, og ólavsøkan er stóri endabresturin av kappróðrinum. Tað er nakað, sum kann savna føroyingar, og nú steypafinalurnar í fótbólti hava fingið sítt uppiborna pláss á ólavsøku, er eisini virðiligt tiltak innan hesa ítrótt undir tjóðarhátíðini.

Fyri mong byrjar ólavsøkan við stóru poppkonsertini í Kommunuskúlagarðinum, og tað er eisini eitt sangtiltak, sum er hæddarpunktið ólavsøkudag. Hetta kvøldið savna túsundtals føroyingar í miðbýnum í Havn til at syngja saman, og hetta er sannliga ein stór hátíðarløta. Tú finnir valla nakað líknandi nakra aðrastaðni, og samleikin hjá okkum føroyingum, sum nú ikki plagar at bila, hevur tað gott hesa løtuna.

Í hesum blað hava vit alskyns tilfar, sum snýr seg um ólavsøkuna og okkum føroyingar. Blaðfólk okkara, sum koma kring alt landið, hava skrivað greinar, og myndamenninir hava eisini verið á ferð. Sosialurin er eitt livandi blað, sum kemur í hvønn krók í landinum, og tí er einki meira sjálvsagt, enn at vit gera eitt serligt blað til tjóðarhátíðina.

Og nú Sosialurin sendir blað í hvørt hús í Føroyum, vilja vit nýta høvi til at ynskja øllum eina góða ólavsøku.

**Sosialurin**



